# Kommunur ósamdar um gjald fyri pláss á sambýli

**Viðareiðis kommuna noktar at gjalda Klaksvíkar kommunu pengar fyri eitt eldri fólk, sum býr á Sambýlinum á Heygnum í Klaksvík. Sosiala nevnd vil nú gera fasta mannagongd fyri, hvussu tað skal farast fram, tá ið eldri fólk úr øðrum kommunum fáa pláss á sambýli í Klaksvík**

ELDRAØKIÐ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Klaksvíkar kommuna og Viðareiðis kommuna eru ósamdar um, hvør skal gjalda fyri eitt eldri fólk av Viðareiði, sum býr á sambýlinum á Heygnum í Klaksvík.

Klaksvíkar kommuna tók stig til byggingina av sambýlinum og eldraíbúðunum, sum eisini eru í grannalagnum, og Klaksvíkar kommuna heldur, at Viðareiðis kommuna eigur at gjalda ein part av gjaldinum fyri fólkið av Viðareiði.

Vanliga gjalda fólk sjálvi eitt ávíst gjald fyri at búgva á sambýlinum, og restina av kostnaðinum stendur Klaksvíkar kommuna fyri.

Viðareiðis kommuna heldur, at eldraøkið er ein landsuppgáva, og tí skal rokningin sendast til landsmyndugleikarnar.

### Gera mannagongd

Sosiala nevnd hjá Klaksvíkar kommunu hevur viðgjørt málið, og har hava tey gjørt av, at fastar mannagongdir skulu gerast fyri, hvussu tað skal farast fram, tá ið eldri fólk úr øðrum kommunum fáa pláss í Klaksvíkar kommunu.

– Vit hava havt fólk úr øðrum kommunum enn Viðareiðis kommunu á sambýli í Klaksvík, og tá hevur eingin trupulleiki verið. Nú hevur eitt ítøkiligt mál stungið seg upp, har kommunurnar eru ósamdar, og so halda vit, at tað er best at gera greiðar mannagongdir á økinum, sigur Jórun Høgnesen, forkvinna í Sosialu nevnd hjá Klaksvíkar kommunu.

Harvið verða treytirnar fyri plássum á eitt nú sambýli í Klaksvíkar kommunu gjørdar púra greiðar fyri øðrum kommunum, áðrenn fólkini sleppa inn.

### Verður búgvandi

Sosiala nevnd hjá Klaksvíkar kommunu ætlar sær at taka ein fund við Viðareiðis kommunu um málið, men tað stendur púra fast, at fólkið av Viðareiði sleppur framhaldandi at búgva á Sambýlinum á Heygnum.

– Vit fara als ikki at órógva fólkið ella tey avvarðandi, og eingin verður koyrdur út. Men tað er best fyri bæði okkum og aðrar kommunur, at treytirnar fyri hesum plássum eru greiðar, og tí skulu vit gera eina mannagongd, sigur Jórun Høgnesen, forkvinna í Sosialu nevnd.

# Býráðsnevndir skulu seta sær mál

**Stóru nevndirnar hjá Klaksvíkar kommunu eru nú farnar undir at gera ætlarnarskjal fyri sítt øki. Hesi skjøl skulu hava við sær, at nevndirnar arbeiða meira miðvíst fram ímóti nøkrum málum, sigur borgarstjórin**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Nú skulu stóru nevndirnar hjá Klaksvíkar kommunu seta sær greiðari mál og málsetningar fyri sítt øki.



*– Býráðsarbeiðið hevur hug til at flóta eitt sindur við hvørt, men við einum ætlanarskjali verður tað nógv greiðari, hvat býráðið ætlar sær, sigur Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík*

Hósdagin í farnu viku vóru allir býráðslimirnir og umsitingin á fundi at tosa um, hvussu býráðsarbeiðið kann verða betur skipað við so sokallaðum ætlanarskjølum.

Hugskotið við hesum skjølum er, at nevndirnar gera sær sjálvum og øðrum greitt, hvat ætlanin er á teimum ymsu økjunum, og hvussu málini skulu náast.

– Býráðsarbeiðið hevur hug til at flóta eitt sindur við hvørt, men við einum slíkum skjali verður tað nógv greiðari, hvat býráðið ætlar sær, sigur Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

### Politikarar og umsiting saman

Nevndirnar hava nú gjørt minni arbeiðsbólkar, sum skulu orða ætlanarskjalið, og tað eru bæði politikarar og fólk úr umsitingini við í hesum arbeiði.

– Umsitingin kundi ivaleyst gjørt nógv av arbeiðnum við einum ætlanarskrivi, men tað er umráðandi, at politikkararnir eru við í hesum arbeiði, so at tað er politisk undirtøka fyri teimum málunum, sum verða sett, sigur Steinbjørn O. Jacobsen.

Málini í ætlanarskjalinum skulu vera so ítøkilig, at tað skal bera til at knýta tey at fíggjarætlanini. Í onkrum føri vera talan um mál, sum arbeitt verður við í nøkur ár, men tó skal bera til ber at luta hesi sundur og sjónliggera, hvussu stórur partur hoyrir til hvørt fíggjarárið.

Gongur tað sum ætlað við ætlanarskjølunum, skulu tey verða liðug fyri jól í ár.

## Eingin greið niðurstøða um SEV

**Klaksvíkar býráðið viðgjørdi týskvøldið framtíðina hjá SEV, men eingin niðurstøða varð gjørd, og máið varð beint í fíggjarnevndina**

SEV
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Varaborgarstjórin í Klaksvíkar kommunu, Jákup Mikkelsen, var herfyri alment frammi við sjónarmiðinum um, at kommunurnar eiga at selja SEV. Hann tók samstundis stig til, at málið kom fyri býráðið í Klaksvík til umrøðu.

Týskvøldið kjakaðust býráðslimirnir í hálvan annan tíma um framtíðarviðurskiftini hjá SEV, og tað vóru bæði røddir, sum talaðu fyri og ímóti at selja SEV.

– Undirtøkan fyri uppskotinum var eitt sindur ivasom, og í øllum førum ber til at siga, at tað vóru ymsar meiningar um málið. Eg haldi, at hetta er eitt so stórt og álvarsamt mál, at vit eiga at fara hóvliga fram, sigur Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

Málið um SEV var beint í fíggjarnevndina.

# »Go« í Føroyahúsinum

**Fríggjakvøldið 23. september verður kafékvøld við GoGoBlues í Føroyahúsinum í Keypmannahavn. Hetta vikuskiftið er bluesfestivalur í Keypmannahavn og spælt verður á átjan ymiskum pallum við einum skara av framúr góðum blues tónleikarum**

KAFÉKVØLD

GogoBlues, sum vann Prix Føroyar 2005, er mannað við Una Reinert Debess, vocalur og guitari, Arnhold Ludvig, bass og Rógva á Rógvu, trummur. Bassisturin og trummuslárin vóru mettir at vera teir bestu í Atlantic Music Event í ár. GoGoBlues hevur nýliga verið í Kanada og ferðast eisini í Norðanlondum. Nú teljast teir við í bluesfestivalinum í Keypmannahavn. Dyrnar i Føroyahúsinum lata upp kl. 21 og opið er til kl. 01. Atgongumerki er einans 40 kr. Sí eisini copenhagenbluesfestival.dk

### Stuðul til New Orleans, sum var fyri vanlagnu

Vit hava sæð og hoyrt um ta øðiligu skaðaódnina, sum rakti stórbýin New Orleans og tók túsundtals fólk av fótum. Í býnum hevur verið sera fjølbroytt og týdningarmikið tónleikalív, sum fólk víða um í heimi hava frætt seg um og tikið eftir. Eisini nógv av hesum virksemi er meint rakt. Tí er avgjørt at skipa fyri stuðulskonsert í Vega til frama fyri hesi tónlistafólk. Tað er bólkurin SP Just Frost, sum hevur valt at gera teirra konsert um teimum í New Orleans til frama. Har vera fleiri aðrir bólkar eisini á palli.

Bluesfestivalurin í Keypmannahavn ætlar eisini at stuðla við at fáa fólk á ymsan hátt at lata nakrar krónur, meðan festivalurin er. - Vit í Føroyahúsinum vilja fegin taka undir við hesum. Heitt verður tí á tey, sum koma til kafékvøldið, um at lata meira enn kr. 40 í atgongumerki. Eisini fer kr. 5 av hvørji fløsku, sum verður seld kafékvøldið.

Hetta ger kanska ikki stóran mun. Tí verður eisini høvi frá 20. - 27. septembur hjá øllum, sum koma inn á gólvið, at lata nakrar krónur til endamálið. Peningurin verður latin til Christian Unity Church, har Dwight Webster er prestur og hevur alstóran týdning fyri tónlistalívið í býnum.

### Nú er gongd komin á aftur

Um summarið er friðarligt. Eftir væl eydnaða ólavsøku var aftur ein steðgur, men frá 25. august hevur verið gongd á aftur. Fótatraðk skipaði fyri frálíkum dansi við fullum húsi 3. septembur og Eyðun Nolsøe var "unplugged" á væl vitjaðum kafékvøldið. Týsdagsdøgverðarnir mennast aftur og ymist er til dagdvølju eftir matin. Fyrsta týsdag í hvørjum mánað er bingo. Stundum eru fyrilestrar/frásagnir sum nú týsdagin 27. septembur, tá ið Anja Holtze heldur fyrilestur um zonuterapi.

Mong gleða seg til at síggja Harkaliðið á palli her 8. oktobur. Annað stórt tiltak verður mentanarnáttin 14. oktobur, har vit m.a. skula hava alskyns fisk á skránni. Men eisini verður mótaframsýning, føroyskur dansur, sangur og upplestur.

Í septembur hevur Selma Mikladal listaframsýning, sum er sera væl umtókt av fólki. Selma, sum er úr Klaksvík og arbeiðir á Ríkissjúkrahúsinum, er sjálvlærd listakvinna. Tí varð hon rættiliga bilsin at síggja, hvussu fegin fólk vóru um myndir hennara.

Á 1. hædd er framsýningin við brúdleypsferð til Føroya í 1938. Hendan framsýning hongur til 24. septembur.

Feløgini í húsinum eru eisini komin í gongd aftur: Fótatraðk, Húsakórið, Talvfelagið, Kvinnufelagið og MFS, sum skipar fyri lestrardegi leygardagin 24. september og hugnakvøldi fríggjakvøldið 30. september.

### Meira at vita um Føroyahúsið

Húsið, sum síðani 1993 hevur ligið á Vesterbrogade 17 A, er dagliga opið kl. 14 - 18. Á heimasíðuni hjá húsinum ber til at fáa mangt at vita um húsið og feløgini har. Heimasíðan eitur www.faroehouse.dk <http://www.faroehouse.dk/> . Hvørja viku verða tíðindi eisini send við maili. Yvir 1000 fólk eru á hesum maillista. Tað ber til at seta seg á hendan listan á forsíðuni á heimasíðuni. Húsið hevur eisini ein faldara við skránni fyri hvønn mánað.

## Sóttreinsað vatn í Árnafirði

Mikudagin varð nýtta vatnreinsiverkið í Árnafirði tikið í nýtslu. Hetta er triðja reinsiverkið hjá Klaksvíkar kommunu.

Alt rávatnið til reinsiverkið í Árnafirði kemur frá Stórhøvdaá, og reinsiskipanin er sandfiltur og UV-stráliútbúnaður.

Drekkivatnsgoymslan er 80 rúmmetrar.